# Jóla-oljuting

**Jólatingið hjá Oljutinginum verður hildið hóskvøldið, komandi á Hotel Føroyum**

OLJUTING
*tíðindaskriv*

Heitið hesaferð er »Leikluturin hjá oljuvinnuni á framtíðar orkumarknaðinum«

Olav Fjell, fyrrverandi forstjóri hjá Statoil, hugleiðir um leiklutin hjá oljuvinnuni á framtíðar alheims orkumarknaðinum. M.a. fer hann at koma inn á týdningin av olju í mun til alternativar orkukeldur.

Nevndin í Oljutinginum er sera fegin um at kunna bjóða limunum í Oljutinginum møguleikan at hoyra ein persón við royndunum hjá Olav Fjell røða um framtíðar leiklutin hjá olju.

Olav Fjell hevur drúgvar royndir innan vinnu- og bankavirksemi, og hevur í longri tíð verið ein av týdningarmestu persónunum innan norskt vinnulív. Størvini ið hann hevur havt eru:

- 2003- Stjóri í First Securities, íløgubanki. Starvið fevnir m.a. um høvuðsábyrgdina av at menna sambondini og tænasturnar hjá felagnum mótvegis tí almenna og teim størstu norðurlendsku feløgunum innan strategiska og fíggjarliga ráðgeving.
- 1999-2003 Forstjóri í Statoil. Í hesum tíðarskeiði menti Statoil seg nógv og víðkaði um virksemið útum Noreg (m.a. Kaspiska havinum, Norður- og Vesturafrika og Venezuela). Umleið 40% av teimum uml. 19.000 starvsfólkunum arbeiða nú uttanfyri Noreg. Somuleiðis varð partur av Statoil einskildur í hesum tíðarskeiði.
- 1995-1999 Stjóri í Postbanken, 4. størsti banki í Noregi
- 1987-1995 Leiðandi størv í Bergen Bank og Den Norske Bank
- 1975-1987 Fíggjarstjóri í Kongsberg Våpenfabrikk

Olav Fjell er 53 ára gamal, hevur útbúgving innan búskap frá 'Norwegian School of Economics and Business Administration' í Bergen.

# Kavin liggur alt vikuskiftið

**Børnini fegnast, og bilførarar stúra, nú nógvur kavin er niðurkomin. Veðurmaðurin á Sosialinum roknar við, at kavin verður liggjandi alt vikuskiftið**

KAVI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

*Børnini stórtrívast í kavanum, og í høvuðsstaðnum ber eisini til at finna øki, har tað kann sletast og skreiðast*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mitt í vikuni fór tað at kava fyri fyrstu ferð í vetur. Tað er ligið langt út árið, og nú hevði kavin bíðað nóg leingi.

Seinastu dagarnar er meira kavi niðurkomin, og tað var, sum tað plagar at vera, tá fyrsti kavin legst. Bilførarar koma illa fyri, nógv ferðsluóhapp vóru, og løgreglan í høvuðsstaðnum noyddist at ávara bilførarar um hálu vegirnar.

Bilverkstøðini hava havt úr at gera við skifta dekk á bilum, so teir verða betur fyri at standa seg – ella koyra – í kavanum.

Meðan bilførar og nógv vaksin stúra og fyrireika seg sum frægast til kavan, so eru tað eisini tey, sum bara leypa út í tað – børnini.

Fyrsti kavin er eisini nakað serligt hjá teimum – altso, serliga stuttligur. Kavadraktir, blóðreyðir kjálkar, kavabløk, sletur og skiir hoyra til hesa ársins tíð, og tað verður góður møguleiki at njóta kavan um vikuskiftið

**Kavin liggur**

Veðurmaðurin á Sosialinum roknar við, at kavin fer at liggja tað mesta av vikuskiftið. Fríggjadagin kavaði framvegis, og tað var kalt. Leygardagin verður framvegis frost.

Petur Skeel Jacobsen sigur í síni forsøgn, at leygardagin verður lot til andøvsgul av norði, seinnapartin fleyr av ymsum ættum. Tað var turt og sólglottar, og hitin verður beint niðanfyri frostmarkið.

Líkt er tí til, at leygardagurin verður ein góður kavadagur – ein av teimum stillu og vøkru.

Tá ið tað líður út á sunnudagin verður tað ávíkavist kemur í. Veðurmaðurin roknar við, at tað fyrrapartin verður yvirhøvur turt, men seinnapartin veksur hann vindin, og tá fer eisini at regna. Hitin kemur upp í fýra til sjey hitastig, og so klárar kavin ikki at standa ímóti.

Bæði mánadagin og týsdagin roknar veðurmaðurin við fleiri hitastigum, og tí er tað um vikuskiftið, at kavin í fyrstu skal njótast.

*Kavin veður liggjandi til seinnapartin sunnudagin, roknar veðurmaðurin á Sosialinum við*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nógv ferðsluóhapp í hálkuni

Politistøðin í Havn fekk fyrradagin ikki færri enn 12 fráboðanir um ferðsluóhapp. Í tí eina førinum vórðu tvey fólk flutt á Landssjúkrahúsið.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at av teimum 12 óhappunum, sum løgreglan í Havn hevði fingið fráboðan um, vórðu eini 8 til 10 av teimum á Kaldbaksvegnum.

Beint fyri klokkan fýra fór ein bilur av Kaldbaksvegnum, og tvey fólk, sum vóru í bilinum, vóru flutt á sjúkrahúsið. Bilførarin breyt annan armin. Bilurin fór heilt illa.

Í flestu førum standast óhappini av, at ferðin er ov høg eftir umstøðunum, ella at bilarnir eru ov illa skøddir.

Fyrrapartin í gjár hevði løgreglan ikki fingið nakra fráboðan um ferðsluóhapp, men á poltiistøðini vóru tey tó vitandi um fleiri bilar, ið vóru farnir útav, og tí høvdu sett seg í samband við sløkkiliðið fyri at fáa hjálp at fáa bilin togaðan upp aftur.

**tn**

# ítróttur

Nr. 223 • leygardagur • 20. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spenningur í grannauppgerð

**Hoyvíkingar vilja reisa seg eftir tapið seinast, men skal Neistin gera nakað sum helst í ár, so mugu teir ígongd nú**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seks dystir skulu leikast í bestu hondbóltsrøðunum, og eru teir allir á skránni sunnudagin.

Hjá kvinnunum tykist ikki vera stórvegis ivi um, hvat av liðunum er favorittur at taka stigini hesaferð. Tey trý, Søljan, VB og Stjørnan eru øll greiðir favorittar, tá tey hitta ávíkavist StÍF, VÍF og Kyndil. Eisini hóast dysturin hjá Søljuni er á útivølli.

**H71 skal uppaftur**

Hjá monnunum tykist spenningurin vera størstur í Havnini, har H71 vitjar Neistan.

Hoyvíkingar hava fyri tað nógva verið heilt frammi í oddinum, men seinasta vikuskiftið mistu teir eitt fet, tá teir máttu lúta fyri KÍF. Tí eru ráðini ikki til at kiksa hesaferð. Tað eru tey tó heldur ikki hjá Neistanum. Hóast spælið hjá liðnum er batnað nakað, so er enn langt upp til vónirnar, sum vórðu settar undan kappingini, og skal liðið hava nakran møguleika at klintra uppeftir, so er tað helst nú, at stigini skulu koma.

Og so er spurningurin, um KÍF annað vikuskiftið á rað kann koppa einum oddaliði. Hesaferð eru tað vestmenningar, sum vitjað, og so er spurningurin, um Kollfirðingar bara vórðu undirmettir av H71 seinast, ella um liðið veruliga ætlar at blanda seg millum ovaru liðini í ár. Fyrra dystin millum liðini var bara eitt mál á muni.

Seinasti dysturin er á Skála, har púrasta uppsteðgaða StÍF tekur ímóti Kyndli, sum ivaleyst vil aftur upp móti oddinum. Hetta líkist í øllum førum einum tryggum útisigri, men strandingar skulu nokk framvegis ikki avskrivast heilt.

# Truplir dystir til oddaliðini

**Bæði kvinnur og menn hjá Mjølni skulu á útivølli royna seg móti liðum, sum royna at ota seg upp móti oddinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Higartil í ár hava menninir hjá Mjølni verið mest sum einaráðandi í kappingini. Enn hava teir tó ikki leikt útidystirnar móti teimum liðum, sum royna at fylgja við í oddinum, og fyrsti av hesum dystum verður hetta vikuskiftið.

Leygardagin vitjar Mjølnir nevnliga hjá Fleyr, og her vil havnarliðið helst gera nógv, til tess at leggja forðingar fyri oddaliðnum.

Í hinum dystinum í mansdeildini skal SÍ á vitjan hjá Fram. Tann dysturin skuldi ikki givið sørvingum stórvegis trupulleikar.

**Óstøðug Dráttur-avrik**

Hjá kvinnunum verða sum vant tríggir dystir á skránni.

Oddaliðið úr Klaksvík skal hesaferð á vitjan hjá Drátti, ið hevur verið sera svingandi hetta kappingarárið. Seinast var tó um reppið, at tær tóku alt í Trongisvági, og kunnu tær finna spælið frá teimum báðum fyrstu settunum fram til hesa uppgerðina, so skal Mjølnir so avgjørt ikki rokna við nøkrum løttum dysti.

Í Hoyvíkarhøllini ætlar KÍF sær ivaleyst øll stigini, tá tær taka ímóti SÍ, og sunnudagin verður so seinasti dysturin, tá TB enn einaferð skal royna seg á heimavølli. Hesaferð móti ÍF.

VÍF-StÍF 24-9 (11-3):

# Málfátækur stórsigur

Talan var ongantíð um stórvegis ivamál í Vestmanna mikukvøldið, tá kvinnurnar hjá VÍF og StÍF tókust.

Hóast VÍF í løtuni ikki hevur eitt lið, sum kann sammetast við tað, ið undanfarnu árini hevur vunnið so nógv, so slapp StÍF ongantíð veruliga framat í kvøld. Bara níggju mál gjørdist talan um tilsamans, og av hesum vórðu tey fimm skotin við brotskasti.

**-jm**

## FAKTA UM DYSTIN

VÍF-StÍF 24-9 (11-3)
Málskjúttar
VÍF: Ioana Rápa 7(2), Annfríða Helgadóttir 4, Eyðritt Andreasen 4(1), Alis Høghamar 3, Tórunn Jónólvsdóttir 3, Linda Johannesen 2, Kirstin Helgadóttir 1
StÍF: Sunfríð B. Jacobsen 5(4), Rebekka Justinussen 2, Rósa Johansen 1, Poula D. Olsen 1
Brotskøst: VÍF 6, StÍF 10
Útvísingar: VÍF 2, StÍF 5
Dómarar: Brandur Johansen & Heri Petersen

# Skovdahl heldur fram

**Royndi Frem venjarin, Ebbe Skovdahl, fer eisini næsta hálvt triðja árið at hava ábyrgdina av Føroya felagnum í Valby**

ÚTISETA VENJARI
*Jóannes Hansen*

Venjarin hjá Jón Róa Jacobsen og Gunnari Nielsen fer eisini næstu árini at verða Ebbe Skovdahl. Í tíðindaskrivi hósdagin seinnapartin boðaði 1. deildarfelagið frá, at felagið og Ebbe Skovdahl hava skrivað undir samstarvsavtalu inntil á sumri í 2007.

Ebbe Skovdahl hevur verið í Frem síðani síðsta vár. Hann kom til felagið, tá ið fyrrverandi venjarin Ole Mørch fekk sekkin.

Í Danmark er Ebbe Skovdahl ein av mest vinnandi venjarunum, og hann verður mettur at vera ein tann royndasti og eisini ein tann besti venjarin. Skovdahl hevur sýnt Jón Róa Jacobsen sera stórt álit. Hann sigur seg rokna føroyska miðverjan sum ein av lyklaspælarunum á liðnum. Málverjin Gunnar Nielsen er eisini partur av besta liðnum. Hann er eykamálverji, og hann bíðar framvegis eftir at fáa møguleikan á besta liðnum.

Eingin í Frem ynskir at fjala yvir, at stóra málið hjá teimum er at endurvinna plássið í bestu deildini. Í løtuni er Frem væl fyri. Tað er vetrarsteðgur í næstbestu deildini, og Frem er næstfrremst.

# Kypros kiksaði

**Ísrael vann í Nicosia og hevur framvegis góðan møguleika at røkka HM endaspælinum fyri fyrstu ferð nakrantíð**

HM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Sæð við føroyskum eygum hevði tað serligan áhuga, tá ið Kypros mikukvøldið hevði vitjan av Ísrael í HM undankappingini. Grannauppgerðin av á sama leikvøllinum í Nicosia, har Føroyar og Kypros í oktober spældu 2-2.

Ísrael legði seg á odda í 1. hálvleiki, men í síðstu løtu undan steðginum javnaði heimaliðið. Í 2. hálvleiki trýsti Kypros góða løtu fyri at fáa sigursmálið. Tá ið tað restaði eitt korter fingu teir so góðan møguleika, sum tað ber til. Men ísraelski málverjin bjargaði framúr væl, tá ið Kypros hevði møguleikan upp á brotsspark. Í síðstu løtu fekk Ísrael sigursmálið, og tað var næstan eingin endi á, so fegnir vóru teir.

Í HM undankappingarbólki 4 er Ísrael heilt væl fyri. Teir vunnu í september heimadystin móti Ísrael 2-1. Saman við Írlandi og Fraklandi er Ísrael á odda í bólkinum við átta stigum. Harvið er framvegis góður møguleiki fyri, at Ísrael fyri fyrstu ferð nakrantíð skal røkka í HM endaspælið, sum í 2006 verður í Týsklandi.

Sveis hevur fimm stig, og Kypros og Føroyar hava eitt stig í part.

Næsta ár skulu Ísrael og Føroyar spæla tvær ferðir, og Kypros, sum eins og Føroyar bara hevur fingið eina stigið í 2-2 javnleikinum móti Føroyum, skulu hittast eina ferð. Føroyar taka ímóti Kypros 17. august, og Ísrael skal vitja í Føroyum 7. september. 8. oktober skulu føroyingar spæla í Ísrael.